## Kryvjimaskina til Bak og Stelk

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Systurskipini, Bakur og Stelkur hjá P/F Beta í Saltangará, skulu nú hava kryvjimaskinu.

Stelkur liggur á Skála og verður umvældur eftir eldsbrunan, og tá ið skipini loysa aftur – saman – væntandi tíðliga í mai, er ætlanin, at tey bæði skulu hava kryvjimaskinu umborð.

### Halda fram

Nú Stelkur ikki er í vinnu, hevur Bakur verið ein túr saman við Nesborg, og ætlandi landar skipið í morgin á øðrum túrinum saman við hvalbiartrolaranum, Sjagakletti.

Ragnar Olsen, reiðari, sigur, at Bakur og Sjagaklettur ætlandi fara at partrola, soleingi Stelkur liggur.

– Eg vænti, at skipini fara at partrola restina av hesum mánaðinum og allan apríl mánaða. Síðan verður Bakur lagdur í nakrar dagar, meðan fyrireikingar verða gjørdar til ísetan av kryvjimaskinu.

Reiðarin sigur, at tá ið systurskipini loysa aftur tíðliga í mai, hava bæði Bakur og Stelkur kryvjimaskinu frá Kronborg í Danmark.

– Hetta verður ein íløga, sum liggur millum hálva og eina miljón fyri hvørt skipið, sigur hann.

### Minni at fáa

Hann veit annars at siga, at Bakur væntandi landar í Saltangará í morgin.

– Fiskiskapurin hjá partrolarunum er ikki so góður í løtuni, sum hann onkuntíð hevur verið, men eg vænti, at Bakur verður næstan fullur, nú hann kemur inn at landa. Ragnar Olsen sigur, at hesin túrurin hevur verið nakað longri, enn seinastu túrarnar annars hava verið í vár.

– Skipini fóru út næst síðsta mánakvøld, sigur reiðarin.

Eilif Gaard, lívfrøðingur:

# Grundarlagið undir okk






*Í samstarvi við Biofar Royndarstøðina í Kaldbak kannar Fiskirannsóknarstovan eisini føroysku firðirnar fyri eitt nú oxygen*

**– Plantonvøkstur er grundarlagið undir allari framleiðslu av fiski á landgrunninum, men framleiðslan er ymisk, ár undan ári. Hetta merkist týðliga aftur í tilgongd og vøkstri av fiski og sjófugli, sigur Eilif Gaard, lívfrøðingur**

NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Plantu-og djóralívið í sjónum er sera fjølbroytt, bæði í støðd og livimáta. Tær smæstu verurnar eru so smáar, at tær ikki síggjast við berum eygum, og tær størstu eru væl størri enn tær størstu á landi.

Á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni hevur Eilif Gaard, lívfrøðingur, eina áhugaverda grein um smáu verurnar í havinum, sum eru grundarlagið undir lívinum hjá fiski og fugli.

### Fleiri liðir

– Smáu verurnar í sjónum, bæði plantur og djór, verða ofta bólkaðar undir felags heitið, "plankton". Plantuplankton rekur, har streymurin førir tað, og soleiðis er eisini við djóraplankton. Felags fyri flestu djóraplankton er, at tey ikki megna at svimja móti streyminum. Tey kunnu tó svimja so mikið, at tey kunnu gera av, á hvørjum dýpi tey skulu vera.

Eilif greiðir frá, at eins og á landi, hava vit eisini í sjónum føðiketur við fleiri liðum.

– Fyrsti liður er plantuplankton, og hetta eru evarska smáar plantur, sum sveima í sjónum, og sum við sólarljósinum sum orkukeldu gera ólívrunnin evni í sjónum um til lívrunnið tilfar. Plantuplankton er soleiðis